# Gøtufótbóltur
## á Vestanstevnu
### sunnudagin 13.juli

Miðvágs Bóltfelag bjóðar øllum gentum, dreingjum og monnum at gera lið til kapping í fótbólti á vøllinum í Miðvági sunnudagin á Vestanstevnu.

**Bólkarnir eru:**
(*Byrja verður kl. 13.00 og liðugt um kl. 16* )

1. *Smápiltar*
2. *Piltar*
3. *Smádreingir*
4. *Dreingir*
5. *Unglingar og vaksnir*
6. *Gentur 10-12*
7. *Smágentur*
8. *Gentur og Kvinnur*

Hjá hvørjum liðið eru 5 leikarar, harav ein er málmaður. Allir bólkarnir spæla á fjórðingsvølli. Loyvt er at hava ein skiftisleikara. Liðini skulu hava fótbóltsnøvn. Liðini skulu hava einslittan búnar. Hvørt liðið meldar somuleiðis ein dómara til kappingina.

Luttøkugjaldið er kr. 100 fyri vaksin, unglingar og gentur, meðan børnini gjalda 50 kr. fyri hvønn. Luttøkugjaldið verður goldið, tá kappingin byrjar. Heiðursmerkið verður latið vinnandi liðnum. Tilmelding fer fram við at ringja 33.2905 ella 22.4124 í seinasta lagi **týdagin tann 8. juli 08.**

**Miðvágs Bóltfelag**

# Reingerðarfólk til Vestmanna skúla

Søkt verður eftir reingerðarfólki til Vestmanna skúla at byrja **18. august 2008.**

Starvið umfatar dagliga reingerð á skúlanum, umframt høvuðsreingerð eina ferð um árið. Arbeiðstíðin er uml. 17 tímar um vikuna.

Arbeiðið er lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Hervør Johansen á tlf. 230108.

Skrivlig umsókn skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi **friggjadagin 18. juli 2008 kl. 12.**

**Vestmanna Kommuna**
Bakkavegur 16
Postboks 91
350 Vestmanna

# Umsorgararbeiði 2009

Umsóknarfreistin fyri at søkja um fíggjarligan stuðul til umsorgararbeiði 2009 er:

**1. september 2008.**

**Hesir bólkar/tiltøk hava rætt til umsorgararbeiði:**
1. Mattænastu til fólkapensjónistar.
2. Koyritænastu ella vitjunartænastu fyri pensjónistar.
3. Dagtilhald fyri fólkapensjónistar ella minnisveik.

**Umsóknin skal:**
1. Greitt tilskila, hvør søkir um stuðul og stendur fyri tiltakinum ella fyriskipanini.
2. Neyvt lýsa virksemið, ið stuðulin verður søktur til.
3. Neyvt útgreina upphæddina, ið søkt verður um, t.d. í lønarútreiðslur, útreiðslur til høli o.s.fr.
4. Upplýsa tal av starvsfólkum, og um hvør hevur ábyrgd av virkseminum.
5. Meta um tiltakið annars og grundgeva fyri tí ágóða, sum pensjónistar kunnu fáa av virkseminum.

Annars verður víst til kunngerð nr. 160 frá 21. desember 2005 um stuðul til umsorgararbeiði, broytt við kunngerð dagfest 19. mai 2006. Henda er at finna á *www.logir.fo* undir Almannaverk - Almannaviðurskifti annars.

**Umsókn skal sendast til:**
Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096
110 Tórshavn

**Umsóknirnar verða avgreiddar í seinasta lagi 15. desember 2008.**

# Leiðari til Musikkskúlan í Sandoynni

Musikkskúlin í Sandoynni søkir eftir leiðara.

**Musikkskúlin væntar, at umsøkjarar skulu:**
• hava kunnleika til musikkskúlaarbeiði
• verða kveikjandi
• duga at skipa fyri
• hava góð samstarvsevni

**Setanartíðarskeið:** 1. september 2008

Løn sambært avtalu, ið skal góðkennast sambært §5 stk. 5 í kommunustýrislógini. Góðkenningarmyndugleiki er Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum.

Umsóknarfreistin er **15. august 2008.**

Musikkskúlin í Sandoy er partur av føroyskum musikkskúlaskipanini.

Starvið er eitt hálvtíðarstarv.

Umsókn skal sendast til:

Formannin í Sandoyar Skúlasambandi
Gerhard Lognberg
Tormansvegur 45
240 Skopun

## Endurlýsing eftir
# pedagogum og hjálparfólki til Vípuna

2 pedagogar 30 tímar, 1 pedagog 20 tímar, 2 hjálparfólk 30 tímar og 1 hjálparfólk 20 tímar, at byrja **1.aug. 2008, ella eftir nærri avtalu.**

Vípan er ein integreraður stovnur við børnum í aldrinum frá 0 -7 ár. Ein stova í aldrinum 0 - 4 ár og ein stova í aldrinum 4 - 7 ár.

Vit hava 8 frítíðarskúlabørn frá 2.flokki í Adventisaskúlanum sum koma her seinnapart.

Arbeiðstíðinar eru skiftandi, frá 7.30 -17.00.

**Vit bjóða eitt áhugavert starv:**
- hvar náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og hvar spæl fyllir nógv
- hvar virðing og trivnaður hjá barninum er í hásætið
- við opinleika og einum jaligum hugburði
- við broytingum hvar tú hevur tína ávirkan
- hvar vit eru byrjaði at arbeiða við "Den integrerende baggrund"

**Vit vænta av tær:**
- At tú ert útbúgvin pedagogur/hevur royndir og fagliga vitan
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- At tú ert opin fyri broytingum
- At tú hevur góð samstarvsevnir yvir fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum
- At tú sært fyrimunir fram um vansar

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyð Skúvadal, leiðara á tlf 317535 / 287535

Umsókn saman við avrit av prógvum og viðmælum, skal verða stovninum í hendi, seinasta lagi **20. juli 2008.**

**Vípan**
Vípuvegur 3
100 Tórshavn
Tlf. 317535/ 287535
bg-vipan@post.olivant.fo

# STARV

Vit søknast eftir ágrýtnum, kundavinarligum fólki, ið er sinnað at arbeiða skiftandi arbeiðstíðir. Ein treyt vit seta er, at tú ert eldri enn 18 ár!!

Um tú ynskir at vita meir, so ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á tlf. 471 471, ella støkka inn á gólvið.

Vit gleða okkum at frætta frá tær ;O)

***Vinarliga Café Chill.***